LM-099/2023

Fylgiskjal 90

Kirkjubøur 22/02-2024

Hoyringssvar til lógaruppskot um burðardygga ferðavinnu.

Vit loyva okkum hervið at koma við einum hoyringssvari til lógaruppskotið um burðardygga ferðavinnu.

Í fyrsti syftu kunnu vit als ikki taka undir við lógaruppskotinum um burðardygga ferðavinnu sum tað fyriliggur og mæla staðiliga til, at tað verður burturbeint.

Lesa vit í øðrum lagi **§ 3, § 5 og § 10** ber í stuttum til at siga at,

her setur man í verk ein alramannarætt (§3), samstundis avtekur man ræðisrættin hjá jarðarumsitarum og letur hendan rættin til ferðavinnuna (§5 Stk 2), og leggur fíggjarligu avleiðingarnar av § 3 og § 5 út til føroyska skattgjaldaran (§ 10) at gjalda fyri negativu avleiðingarnar av almannarætti og ferðavinnu í lógaruppskotinum.

Jarðareigarin kann ikki so frætt sum nokta ágangin, sum honum og virksemi sínum og Føroya náttúru verður fyri.

Ein verulig gjøgnumgongd av verandi lógum á økinum, har sum fyrimunir og vansar verða lýstir út í æsir, eigur at verða gjørd. Ikki minst í samband við grein 41, 42 og 43, sum lógaruppskotið leggur upp til at avtaka.

Í verandi lógarverki hava vit allar møguleikar at verja náttúru, stýra ferðslu og annars skipa ferðavinnu lokalt. Alt hetta uttan at tað kostar almenninginum nakað sum helst.

Vit taka undir við at náttúrugjald verður kravt, at nýta til okkara uml 500 km av varðagøtum, og viðkomandi myndugleiki fær hetta at umsita til ábøtur.

§ 3 í lógaruppskotinum ger tað fullkomuliga óneyðugt at gera gøtur ella annað, tá øllum verður frítt at fara. Heldur fáa vit ein óneyðuga stóran yvirbygnað, sum skal greina sokallaðu økini.

Vit óttast fyri at úrslitið verður ein ørgrynna av skeltum v.m,. ið vísa til viðbrekna náttúru, t.d. skúgvabøli, æðuvarp, sjáldsaman gróður, ternubøli, djór á biti, brattlendi o.s.v.

Við hesum lógaruppskoti standa allir jarðareigarar í Føroyum til at missa allan sjálvsavgerðarætt á ognum sínum. Og størsti taparin av øllum verður okkara sera viðbrekna náttúra.

Eftir okkara tykki, er náttúra okkara alt ov virðismikil til at verða løgd út til ein so víðfevndan allemannsrett sum grein 3 leggur upp til. Sjálvt ikki í Noregi og Svøríki er allemannsretten so víðgongdur á ognunum hjá øðrum.

Eftir henda ovurhonds ágang móti øllum tí, vit vanliga skilja við ognarrætt og harvið rættindi at skipa viðurskifti á egnari ogn, loyva vit okkum at spyrja.: **Hvat verður tað næsta???**

LM-099/2023

At enda taka vit undir við sjónarmiðunum í hoyringssvari frá bóndafelagum og óðalsfelagnum.

Vinaliga

Guðrið og Jóannes Patursson

Heima á Garði 1

175 Kirkjubøur

Tel 218089